Lýsingartorgið

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
✓ **privatar lýsingar**
✓ **í mesta lagi 40 orð**
✓ **bert ein lutur í hvørjari lýsing**
✓ **hægsta søluvirði 20.000 kr.**

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
✓ **frá fyritøkum og virkjum**
✓ **fleiri enn 40 orð**
✓ **søluvirði oman fyri 20.000 kr.**

tó minst 50,- kr. + MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
50,- kr. + MVG hvørja ferð:
✓ **lýsingar undir teigunum: »Dansur«, »Fundir« og »Matur«**
✓ **Bill. merktar**

Akfør

2 FORD ESCORT 1,6 CL
annar bilurin hevur plátur og koyrir væl, hin koyrir og er góður til eykalutir. 4 plíkadekk á felgum og 4 sporttfelgur á dekkum fylgja við. Til sølu fyri 7.000 kr.
Tlf. 332844

4 FELGUR
13" felgur við skálum til Ford Sierra, til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 444276

4 PÍKADEKK
á felgum 155/70-R14, lítið brúkt, passa til smáar Ford bilar.
Tlf. 373054

APRILIA RS 50
Árg. 98 til sølu.
Tlf. 282303 eftir kl. 18

BILAR TIL SØLU
Ein Opel Senator við aircondition, aut. gear, sporttfelgum og fart piloti. Ein Honda Accord frá 1991, báðir í góðum standi.
Tlf. 284747, 216777 og 456777

CIVIC TIL SØLU!!
Honda Civic sedan ´88, silvurgráur, koyrt 153.000 km. til sølu fyri 9.000 kr.
Tlf. 319969 ella + 45 23344627

DAIHATSU CHARADE
Til sølu fyri 2.000 kr. ongar plátur, best egnaður sum eykalutir, kann koyra, nógvir góðir lutir.
Tlf. 283645

DIESEL BILUR
1 ára gamal Citroen Xantia, turbo diesel, 1,9, við skaða. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 441381

DIESEL MOTORUR
til Toyota Corolla árg. ´86, til sølu fyri 5.000 kr. Hevur koyrt 220.000 km. Nýliga høvuðsumvøldur.
Tlf. 213213

ESCORT 1,8 D
st. car. frá Týsklandi, árg. ´92, 110.000 km. Servostýring, nýggjar alufelgur við dekkum, nýggj vetrardekk. Sýnaður í nov. ´99. Sær gott út, kostnaður 68.000 kr.
Tlf. 321718 ella 22351178

EYKALUTIR TIL TOYOTA CAMRY
SV70-21 árg. 88-91 hurðar v/f v/a bakrútur síðurútar, startari, dríveksil, topstykki, 1.8 gittar varmaapparat o.a.
Tlf. 455843

EYKALUTIR TIL TOYOTA CARI
ST 171 árg. 88-91. Hurðar v/f v/a h/f bakrútur og síðurútar. El rútavindara startari, dríveksil og tendrin.
Tlf. 455843

FELGUR OG DEKK
4 Volvo sportfelgur-model 240 - tríggjar v-dekkum og eitt píkadekk 165x70x14. Bíliga til sølu.
Tlf. 312363

FORD ESCORT
1,6, árg. ´87, við króki, í góðum standi. Til sølu fyri 10.000 kr. ella eitt boð.
Tlf. 314425

FORD ESCORT 1,6 CL
árg 7/95, er í góðum standi. Fá nærri at vita, um bilin við at ringja
tlf. 283566

FORD ESCORT 1,6 i CLX
aug ´95, koyrt 53.000 km. v/ sóltaki, powerstýring, centrallás, radio v/ cd. spælara. Til sølu fyri 78.000 kr. kontrakt kan yvritakast.
Tlf. 22475528 ella 75141812

FORD ESCORT SAVOY
Árg. 89, svartur, 5 gear, sær gott út við píkadekkum, til sølu fyri 12.000 kr.
Tlf. 317865 & 282165

FORD FIESTA
Ford Fiesta árg. 89 bíliga til sølu. Koyrir, men kann eisini brúkast til eykalutir.
Tlf. 333354

FORD FIESTA
hvitur, árg. ´88, til sølu. Hevur plátur. Prísuppskot 12.000 kr. Gev boð.
Tlf. 312079

FORD FIESTA ÁRG. 1987
v/skaða framman. Kann koyra. Einans koyrt 36.000 km.
Tlf. 316005

FORD SIÉRRA
85-90. Nakað av eykalutum bíliga til sølu.
Tlf. 283645

FORD SIERRA 1,6
Árg ´86. Koyrir væl, men hevur ongar plátur. Sera góður til eykalutir, ella at seta í stand.
Tlf. 374609

FORD SIERRA 2,0 I
árg. ´89 til sølu. Hevur m.a. el-rútar, powerstýring, hita í forrútinum, sportfelgur og 2 hurðar. Bilurin er í sera góðum standi.
Tlf. 375265

GERIÐ KVETTIÐ
Knapt 1 ára gamal Mazda 323 selist við sórum avsláttri, kan síggjast hjá P/F Wenzel

OPEL KADETT
Diesel, bíliga til sølu. Áhugaði kunnu ringja í døgurðatímanum.
Tlf. 455861

TOYOTA CAMRY 1,8 GL
Árg. 86. Fleiri nýggir deilir. Hevur nýggj heilsársdekk, sportfelgur við dekkum fylgja við 195x60x15.
Tlf. 443311

HYNDAI SONATA
1.8 i, árg. ´90, bilurin er gráur sær gott út og er í sera góðum standi, hann hevur powerstýring, alufelgur. Við fylgjur eitt sett av vetrardekkum.
Tlf. 220744

MAZDA 323
árg. ´84, í góðum standi, til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 444125

MAZDA 323, 32 BF
árg. ´87, nýsýnaður, til sølu vegna flyting. Prísuppskot 16.000 kr.
Tlf. 441484 eftir kl. 15.

MAZDA BUSSUR
e 2200, 100.000 km. til sølu. Sama slag við høgum taki kann fylgja við sum eykalutir.
Tlf. 216887 ella 316887

MOTORUR TIL SØLU
Toyota 3B motorur í besta standi til sølu passar til Toyota Landcruicer og Dyna. Toppstykkið defekt. 100.000 km.
Tlf. 332025 ella 214025

NISSAN BLUEBIRD
2.0D árg. 1/90 til sølu fyri 80.000 kr.
Tlf. 372800 - 288802

NISSAN BLUEBIRD 2,0 SLX
til sølu. Árg. 89. Bilurin hevur el-rútar, el-spegl, sentrallás, power stýring, 15" sporttfelgur við góðum dekkum + 4 nýggj heilársdekk á felgum. Nakað av eykalutum fylgja við. Sær sera gott út og er í góðum standi. Prísuppskot 22.000 kr.
Tlf. 441888 & 443294 Kristvar

NISSAN CHERRY
Turbo, krevur smærri ábøtur, til sølu fyri 4.500 kr.
Tlf. 217747

NISSAN KING VAN
24 E diesel koyrt einans 130.000 km sær gott út og er í sera góðum standi, nýggj 8 løgs píkadekk á felgum fylgja við, til sølu fyri 45.000 kr.
Tlf. 449290 & 282290 eftir kl. 16

OPEL ASCONA
árg.´84, aut.gear, kostnaður 10.000 kr.
Tlf. 282828

OPEL CORSA SVING 1,4
Gráur, árg. 96, koyrt 51.000 km, hevur m.a. 5 hurðar, sentrallás, elspegl, servostýring, píkadekk á felgum og summardekk á sporttfelgum. Í góðum standi, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 319702

OPEL KADETT 1,3
Árg. ´87, bíliga til sølu.
Tlf. 422082

OPEL KADETT 1,3
til sølu sum eykalutir. Koyrir ikki. Kostnaður 3.000 kr.
Tlf. 319382 & 217725

OPEL VECTRA ÁRG. 1/97
2.0 i CDX 16 v, 5 hurðar 60.000 km. Við allari eykaútgerð, øll eftirsýn yvirhildin. Hevur alarm, radio, bandspælara, 6 stk. CD Box, 15"alu felgur og eyka vetrardekk á felgum. Til sølu fyri hægsta boð. Jeepur kann møguliga ganga inn í keypið.
Tlf. 219194 & 319194

SIDEVOGN ACAP
passende til BSA/NIMBUS sælges billigt for 4.000 kr., grundet pladsmangel.
Tlf. 319618 Jan

STOP STOP
hygg her! Daihatsu Charade 1,0 árg. ´88. Til sølu, prísin kunnu vit tosa um.
Tlf. 321618 eftir kl. 18

SAAB 90
árg. ´86, sær hampuligt út, nógvir nýggjir deilir. Sýnaður í okt. ´99.
Tlf. 313383, Ingi

TIL SØLU
Baghjulsdæk til veteranmc. sælges for kr. 800 kr. Dækket er aldrig brugt, højprofil og i str. 19x3.50. Passer til bl.a. BSA/TRIUMPH/NORTON og NIMBUS.
Tlf. 319618 (Jan)

TIL SØLU
Mitsubishi Pajeru 2.3 turbo diesel árg. 86. Longra modelli, setur aftan og er í góðum standi. Nýsýnaður og motorurin hevur koyrt 102.000 km. Ein motorur og skermar fylgja við sum eykalutir.
Tlf. 211543

TIL SØLU
Citroen BX 16 TGS, árg. ´90 við nógvum eykalutum, bíliga til sølu.
Tlf. 333304 ella 213146

TIL SØLU
King-Cab, árg. 1985, bíliga til sølu.
Tlf. 282691/317691

TIL SØLU
Ford Escort, árg. 88, til sølu fyri 6.000 kr.
Tlf. 441950

TIL SØLU
Opel Kadett hevur koyrt 70.000 km, góð píka- og summardekk á felgum, til sølu fyri 5.000.
Tlf. 361758 & 211360

TIL SØLU
Toyota Corolla árg. nov. 1984 AE/80 5 hurðar, sum eykalutir 3.000 kr.
Tlf. 441446

TIL SØLU
sum eykalutir. Mitsubitzi lancer st.car 1500, árg. ´86. Koyrir, hevur plátur. Prísur 2.800 kr
Tlf. 441100 ella 281044

TIL SØLU
Vøruvognur koyrir væl og sær gott út.
Tlf. 210207

TOYOTA CAMRY 1.8 GL
Árg. 86. Fleiri nýggir deilir. Hevur nýggj heilársdekk. Sportfelgur við dekkum fylgja við 195x60x15.
Tlf. 443311

YMISKIR EYKALUTIR
til Scania LS 111, til sølu.
Tlf. 215821

TOYOTA CARINA II
árg 11/91, el-sóltak, cd-spælara, eyka sett av felgum. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 449259 ella 219259

TOYOTA COROLLA
1,3. Árg. 86 er í góðum standi, bíliga til sølu.
Tlf. 448887

TOYOTA COROLLA 1,6
gráður, frá 2/99, koyrt 4.000 kr. til sølu við stórum avsláttri.
Tlf. 310767 ella 217406

TOYOTA COROLLA 1,6
Árg. 1987, til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 449360 & 447962 eftir kl. 18

VETRARDEKK TIL SØLU
Nýggj lamell/píkadekk, flest allar støddir, til sølu.
Tlf. 282691 & 317691

VW PASSAT
Árg. 87 í góðum standi, til sølu.
Tlf. 441097 & 282385

YNSKIST
Er tað nakar, ið hevur rútaravindarar v/ veiri til ein Mazda 323 BF, árg. ´86, bíliga at selja mær.
Tlf. 422358 ella 316142

YNSKIST
Kaboratorur til VW Passat (árg. 85) ynskist til keyps.
Tlf. 455809

YNSKIST
2 (4) dekk, 205/50-16 ella 2 (4) dekk 195/55-16, ynskjast til keyps. Ring
tlf. 319704 ella 283653

Amboð

TIL SØLU
Ein KEV. hátrýst spulari 140 bar.
Tlf. 361180, eftir kl. 20

Arbeiði

ARBEIÐI SØKIST
24 ára gamal maður, søkir alt fyrifallandi arbeiði, yvir styttri ella longri tíðarskeið.
Tlf. 315861

BILUMVÆLING!
Alt innan bilumvæling, so sum uprætting, lakering, servive og el. Ring og fái eina tíð. Tilboð verða givin.
Auto Tek
Tlf. 221006

FA. HÚSAUMVÆLING: TIMBURARBEIÐ
Alt timburarbeiði verður gjørt.
Tlf. 215214

GOYMSLUFÓLK
Søkt verður eftir goymslufóki, at byrja skjótast gjørligt. Kunnleiki innan el-tól er ein fyrimunur.
Hvítvørutænastan
Tlf. 317786 ella 283868

TILBOÐ YNSKIST
uppá at grava út og planera eitt grundstykki í Tórshavn.
Tlf. 321225 & 211232

TILBOÐ YNSKIST
uppá at klæða eini sethús í Eysturoynni.
Tlf. 441225

Lýsingartekstur

.....

.....

.....

.....

.....

.....

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir *(set X)*
undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Bræveskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Matur
❑ Pløgg	❑ Samband	❑ Súkklur
❑ Teldur	❑ Tónleikur	❑ Út- & Sjónvarp
❑ Ymiskt	❑ ……	❑ ……

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12.00. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi

Sent hevur:

Navn: ……

Bústaður: ……

Bygd/býur: ……

Tlf.: ……

»Lýsingartorgið«
Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76,
110 Tórshavn

Til frímerki

Barnaútgerð

BABYLIFT
við jarnsíðum, góðkend at brúka í bili, sær út sum nýggj, til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 312729

BRIO BARNAVOGNUR
til sølu, grønur við babylift, í góðum standi, til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 310924

BARNAVOGNUR
Vælhildin myrkabláur Simo barnavognur við lift og skiftitasku ið passar til. Íroknað madrassur og regnslag. Brúkt til eitt barn.
Tlf. 320211

BILBARNASTÓLUR
ynskist, helst ein berbarur (0-1 ár), og ein snugliposi.
Tlf. 311322

TIL SØLU
Pearl grulvigarður (eldri modell) við 6 clamps + 2 bekkarastativ til sølu fyri kr. 900,- tlf: 361040, mobil: 211044, e-mail: hjalt@forum.dk

TIL SØLU
Væl viðfarin babylift og babysittari fyri 400 kr. Pusliborð við kommodu (3 skuffur) og baðikar 600 kr.
Tlf. 374609

TIL SØLU
Bláur vælhildin 1 1/2 ára gamal Simo barnavognur við lift og puslutasku, til sølu fyri 3.000 kr. Keypsprísur umleið 6.000 kr. Sera lítið brúkt barnasong 1 ár, til sølu fyri 600 kr. og ein góðkendur Baby-Bjørn beriseðli til sølu fyri 250 kr.
Tlf. 321213

Barnaansing

HEY!!!
Eg eiti Jákup og eri 1 ár, er tað nakar sum tímur ansa eftir mær, meðan mamma og babba eru til arbeiðis?
Tlf. 456211

BARNAGENTA M/K SØKIST
Til tveir dreingir, 1 1/2 og 3 1/2 ára gamlir. At byrja beinanvegin.
Tlf. 456922
Dorit og Esbern

BARNAANSING
Er tað nakar sum kann ansa eftir Rebekku og Regin (2 ár og 9 mór.) aðruhvørja viku. Møguliga fyri eitt styttri tíðarskeið.
Tlf. 424070

GENTA/KONA
søkist at ansa eftir 1/2 ára gomlu Hildur, hálvan dag, skjótast gjørligt.
Tlf. 310306

Bingo

KIWANISKLUBBIN RÓSAN
Hevur bingo í Pállstovu leygardagin 15. jan. kl. 15.00, gávukort + síðuvinning til fulla plátu. Drigið verður millum spølini, 15 vinningar á lutaseðlum m.a. 6 gávukort á 500 kr. 15 plátur kr. 100. Eisini verður eykaspæl. Koyring heim. Øll eru vælkomin.
Kiwanisklubburin Rósan

STUÐLAFELAGIÐ GLOTTIN
hevur gott bingo í Pállstovu hvørt mikukvøld kl. 19. Full pláta 500 kr. + síðuvinningar. Drigið millum spølini 15 vinningar á lutaseðlum m.a. 3 gávukort á 1.000 kr. 15 plátur 100 kr. Koyring heim. Eykaspæl.
Stuðlafelagið Glottin

BINGO
verður í Kappróðrarneystinum í Streymnesi 17. jan. kl. 19. Eykaspælið 1.200 kr. Øll eru vælkomin.
H.S.R.

Burturm. / funnið

JAKKI
Tann sum av misgávum tók ein svartan leðurjakka í VB-húsinum 2. jólakvøld, verður biðin um at ringja.
Tlf. 373465

JAKKI
Tann sum av misgávum, hevur býtt um við mín svarta jakka, í VB-húsinum 2. jólakvøld, vinarliga ring
tlf. 373299

JAKKI
Tann sum av misgávum hevu tikið jakkan hjá mær í ungmannafelagshúsinum á Sandi nýggjársaftan, geri so væl at siga frá á tlf. 361461. Jakkin er myrkabrúnur við skinnkraga.

JAKKI!!!
Tann, sum av misgávum tók ein svartan klædningsjakka í KÍ-høllini 2. jólakvøld, biðjist vinarliga ringja tlf. 455068

LÍTIL KETTA HORVIN
Hvít, reyð og brúnstríput við tumlum og reyðum hálsbandi. Hon er horvin á Djúpagilsvegnum á jólum. Vinarliga ring um tit hava sæð hana. Finningarløn verður latin.
Tlf. 315911

Býli

FRIÐARLIGUR
miðaldrandi maður søkir íbúð í Havn, ella nærhendis Havnini. Eg fari væl um, og gjaldi til tíðina.
Tlf. 315575

GARAGA/ GOYMSLUHØLI
v/ lítlum kontóri ynskist til leigu í Tórshavn ella nærhendis.
Tlf. 317865 ella 282165

GRUNDØKI
í Miðvági er til sølu um hóskandi boð fæst. Mat.nr. 322 F, vídd: 700 m².
Tlf. 332005

HÚS Á TOFTUM
til sølu.
Tlf. 282385 & 441097

HÚS ELLA ÍBÚÐ
Ung hjún, ynskja hús ella íbúð, til leigu á Skálafjørðinum sum skjótast. Vinarliga ring
tlf. 315390
Anna og Hugo

HÚS Í LAMBA
til leigu í hampuliga góðum standi, fyri sámuligan prís. Vinaliga ring
0045-75157729

HÚS Í VÁGI
Eldri hús í Vági til sølu. Húsini eru 77 fermetrar í 2 hæddum + garaga. Liggja væl fyri og hava gott útsýni. Húsið fekk nýtt tak í summar, men krevur ábøtur uttanfyri. Prísuppskot: 450.000 kr.
Tlf. 374433

HÚS Í VÁGI TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst . Matr. nr. 348 o Skólabeiti. Hús 120 fermetrar kjallari 70 fermetrar innrætta. Grundøkið 647 fermetrar. Byggiár 1980.
Tlf. 373611

HÚS/ÍBÚÐ
Ynskist til leigu Í Klaksvík, skjótast gjørligt. Vinarliga ring
tlf. 456061

Bústaðarveiðan

Fyri nakrar av kundum okkara sóknast vit eftir sethúsum og grundøkjum, sum lúka niðanfyri nævndu ynskjum. Um tygum halda, at hetta svarar til ogn tygara, sum ætlanin er at selja, so set tygum í samband við okkum – møguliga hava vit rætta keyparan.
Vit átaka okkum at selja fasta ogn um alt landið.

Nr. 835
Stað: Tórshavn
Slag av húsum: Íbúð undir Fjalli ella Berjabrekku
Stødd: Egnað til tvey fólk
Kostnaður: Einki krav

Nr. 841
Stað: Norðragøtu
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Umleið 120 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 700.000,-

Nr. 842
Stað: Tórshavn
Slag av veiðu: Eigaraíbúð
Stødd: Egnað til eitt fólk
Kostnaður: Í býti við vælhildin gomul hús í Kollafirði

Nr. 843
Stað: Tórshavn, Hoyvík, ella Argir
Slag av veiðu: Stór sethús (4-5 íbúðir)
Stødd: Uml. 300-400 m²
Kostnaður: Einki krav

Nr. 845
Stað: Nes, Toftir, Gøta, Leirvík ella Kambsdalur
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Egnað til hjún við 2 børnum
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 600.000,-

Nr. 846
Stað: Tórshavn (høgliga í býnum)
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Uml. 100 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 1.500.000,-

Nr. 847
Stað: Tórshavn, Argir ella Hoyvík
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Uml. 100 m² (helst 3 kømur)
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 1.200.000,-

Nr. 848
Stað: Tórshavn, Argir ella nærhendis
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Uml. 80 m² + kjallara (3-4 kømur)
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 800.000,-

Nr. 851
Stað: Tórshavn
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Lítil hús (møguliga sjálvur seta tey í stand)
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 600.000,-

Nr. 852
Stað: Argir
Slag av veiðu: Sethús ella tvíhús
Stødd: Uml. 100m² – 120m²
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 1.100.000,-

Nr. 853
Stað: Skála kommunu
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Minst 2 kømur
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 400.000,-

Nr. 854
Stað: Klaksvík
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Minst 2 kømur
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 500.000,-

Grundøki

Nr. 839
Stað: Tórshavn, Argir ella Hoyvík
Slag: Ídnaðarøki
Stødd: Uml. 500 til 2000 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 700.000,-

Húsamekling Sp/f Protek,
Vaglið • Box 331 • 110 Tórshavn,
Tlf. 319321 • Fax 319331
E-mail: protek@post.olivant.fo
Avgreiðsla kl.10-12 og 13-16.
Keyp og søla av fastari ogn

ÍBÚÐ
í Tórshavn søkist. Friðaligur ungur maður søkir eina minni íbúð skjótast gjørligt.
Tlf. 215727

ÍBÚÐ ELLA KAMAR
ynskist til leigu í Havn, til ungan mann við føstum arbeiði, skjótast tilber. Vinarliga ring
tlf. 422594 ella 373072

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
2-verilsis íbúð í KBH NV til sølu, í góðum standi.
Tlf. 442181

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
Ynskist til leigu. Eg eri ein 24 ára gamal maður ið fegin vil leiga eina íbúð í Keypmannahavn, skjótast gjørligt. Alt hevur áhuga. Vinaliga Torkil Olsen, datamatikari
Tlf. 0045 32888397
fartlf. 0045 26153300
e-mail: tol@maersk-it.dk ella torkilolsen@hotmail.com

ÍBÚÐ Í VESTURBÝNUM
Íbúðin er 60 fermetrar til leigu fyri 3.500 kr + ljós.
Bill. mrk.: 749027

ÍBÚÐ SØKIST
Er tað nakar sum hevur eina íbúð til leigu í Havn, so vinaliga ring.
Tlf. 321171

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Stór íbúð til leigu í Havn.
Tlf. 447236 - 319527

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Havnini. Vit eru eini ung hjún, við føstum arbeiði, sum hava brúk fyri einari íbúð sum skjótast. Vinarliga ringið á
tlf. 283465

ÍBÚÐ YNSKIST
Til leigu í Havn. Vit eru eitt par við einum barni og vit fara væl um.
Vinaliga ring tlf. 315249

MAMMA VIÐ 2 BØRNUM
13 og 1 ár. Vit leita eftir íbúð/húsum í Havn, skjótast gjørligt til leigu.
Prísuppskot 3.000-3.500 kr. Tlf. 311747 & 315624

ÍBÚÐ YNSKIST TIL LEIGU
Ung genta ynskir íbúð í Havn. Havi fast arbeiði.
Tlf. 317064 Eydna

ÍBÚÐ/HÚS YNSKIST
Ungt lærarapar søkir íbúð/hús í Havn skjótast gjørligt.
Ann-Mari og Jákup.
Tlf. 318224

HØLI TIL LEIGU Í MIÐBÝNUM
til handil ella skrivstovu.
Tlf 315438

KAMAR/LÍTIL ÍBÚÐ SØKIST
til leigu í 1/2 ár í Havn.
Tlf. 332311

KEYPMANNAHAVN
Eg eri ein 23 ára gomul genta, ið ynski at leiga (framleiga) eina íbúð í Keypmannahavn. Skal byrja at lesa 1. feb. og havi einki at búgva í. Royki ikki.
Vinaliga ringið tlf. 447052

LÍTIL ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Havn fyri ein sámuligan prís.
Ring á tlf. 311243

LÍTIL ÍBÚÐ
ella stórt verilsi v/ atgongd til køk og bað. Ynskist til leigu í Havn.
Tlf. 321091 ella 424225

LÍTIL ÍBÚÐ YNSKIST
ella stórt verilsi við atgongd til køk og bað, helst í Havn ella nærhendis.
Tlf. 327091 & 424225

NEYÐARRÓP
Mamma við 3 fittum børnum, søkir íbúð í Havn ella nærhendis skjótast møguligt.
Bill.mrk. 20237

SKRIVSTOVUHØLI YNSKIST
Minni skrivstovuhølið ca. 20 m² ynskist í miðbýnum í Havn.
Tlf. 220398 ella 321625

UMBÝTING!
Hús í Hoyvík til leigu, í sera góðum barnavinarliga umhvørvi. Eg ynski eina íbúð nærhendis býnum. Hevur hetta tín áhuga, vinarliga ring til mín á
tlf. 318562 ella 314356

ÚTLEIGAN
til lagur, ca. 60 m² av kjallara er til leigu.
Tlf. 319239

Dýr

„NEWFOUNDLENDER“
Vegna serligar umstøður selji eg føroya størsta hund, sum er ein „Newfoundlander“, hann er 100% ektaður og sera barnavinarligur. Ring á kvøldi
tlf. 211372

HAMSTARAR TIL SØLU
1 par við búri og ein hannur.
Tlf. 457909

HUNDAHVØLPAR
tveir fittir hvølpar verða latnir djóravinum. Vinarliga ring
tlf. 316747 eftir kl. 19

HUNDAHVØLPUR
Eg eri ein 10 vikur gamal hundahvølpur sum søki eftir einum góðum heimi, bert til hundavin, eg eri sera blíður.
Tlf. 456296 ella 456776

KANINIR TIL SØLU
Eitt sera fitt kaninpar við búðuri til sølu.
Tlf. 424795

KETTLINGUR
fittur kettlingur, hvítur, gráur/brúnur uml. 9 vikur, fæst við at ringja
tlf. 313979 eftir kl. 17

KETTLINGUR
3 mór. gamal, reyðstríputur kettlingur fæst við at avheinta hann.
Tlf. 319184

KETTLINGUR YNSKIST
Djóravinur vil geva einum kettlingi eitt gott heim. Helst úr Suðuroy.
Tlf. 287810

NORSK SKÓGKETTA
í fleiri litum, umleið 16 vikur gomul, burturblivin í Vesturbýnum tann 4. jan.
Tlf. 317217

REINLIGUR
kettlingur verður latin djóravini.
Tlf. 421156

VIT HAVA 2
reinligar kettlingar, annar er reyður, hvítur og svartur. Hin er reyður og hvítur. Kunnu latast til djóravinir.
Tlf. 313002

Fundir

LÆRARATELDUBÓLKURIN
Fundurin, ið skuldi verða 15. januar er útsettur til einaferð í vár. Tit fáa boð.
Fyrireikararnir